DAGSINS MEINING

Takk fyri veturin

Skiftið til summartíð markeraði á ein hátt, at eisini ítróttarkappingarnar kring landið eru í ferð við at skifta ham.

Eftir at mesta hevur gingið fyri seg innandura í vetrarhálvuni, verður nú farið út, har bæði veður og vindur eru meira innbjóðandi, enn tey annars hava verið í myrku tíðini.

Men hóast myrk, so hevur hendan tíðin á ongan hátt verið keðilig. Fyri tveimum vikum síðani endaði flogbóltskappingin í einum sonnum braki á Kambsdali, har klaksvíkingar í tveimum dystum ognaðu sær tvey gullmerki, og nú leygardagin verður tað so hondbólturin, sum setir punktum fyri eini framúr spennandi kapping.

Og við einum seinasta altavgerandi dysti millum tey bæði mest vinnandi mansliðini í føroyskum hondbólti, eru eisini allir karmar í lagi fyri einum framúrskarandi enda á landskappingini.

Verða tað sigursvandu VÍF-leikararnir, sum kunnu heingja enn eitt gullmerki um hálsin, ella er tíðin nú aftur komin til Kyndil, eftir at teir hava staðið at kalla í skugganum seinastu árini. Ár sum so sanniliga hava verið drúgv bíðitíði hjá Kyndilsfólki, har gull og heiður annars tykist vera partur av gerandisdegnum.

Hvussu er og ikki, so verður tað vinnarin leygardagin, sum strýkur avstað við øllum. Higani verður í øllum førum ynskt góðan dyst til bæði leikarar og viðhaldsfólk, og ein stór tøkk til øll teirra, sum við ítróttaravrikum sínum hava gjørt ein myrkan og tungan vetur nakað nógv lættari at koma ígjøgnum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Farvælferð

(Viðmerking til Knút Eysturstein)

Helgi Abrahamsen

Kjakið millum meg og Knút Eysturstein hevur nú vart somikið leingi, (og greinarnar eru blivnar so langar) at tíð skjótt fer at vera at gevast. Men her er tó enn ein grein í røðini

24. mars hevði Knút Eysturstein ta higartil seinastu greinina í kjakinum okkara millum. Men heldur ikki hesa ferð svarar hann spurninginum sum eg setti honum um, hvussu Føroyska fullveldið skal fíggjast, og hann vísir enn einaferð á, at spurningurin er settur skeivum persóni. Tað er í lagi. Men so vil eg spyrja, hvør er rætti persónurin at spyrja? Heilir felagsskapir, politiskir flokkar og samgongur hava arbeitt við fullveldisætlanini nú í nógv ár, so tað kann ikki bera til, at EINGIN skal vera rætti persónur at spyrja, hvussu hetta skal fíggjast.

Ein av umberingunum hjá Knúti, fyri at sleppa undan at svarar mínum spurningi um fígging av fullveldinum hevur verið, at tað er uppgávan hjá serfrøðingum at gera fíggjarlógaruppskot. Eg spurdi í tí sambandinum, um tað ikki var tað, sum vit høvdu politikarar til ? Og Knút svarar, at politikarar kunnu taka serfrøðingar við uppá ráð, áðrenn teir taka avgerðir. – Jú men, hví gera teir so ikki tað ? Hví spyrja fullveldispolitikarar ikki serfrøðingar um, hvussu eitt føroyskt fullveldi verður fíggjað við føroyskum pengum? So kundu teir aftaná greitt okkum »vanligu« føroyingum frá svarinum. Men sjálvt tað hava teir ikki gjørt !

Hvør bað um danska fígging ?

Í eini fyrri grein vísti eg á, at fullveldislandsstýrið dugdi ikki at vísa á nakra aðra loysn viðvíkjandi fíggingini av fullveldinum, enn at biðja donsku stjórnina geva teimum langa skiftistíð. Men nú sigur Knút, at tað var Nyrup, sum hevði skuldina av hesum.

Men hetta er ikki rætt. Tað var ikki Nyrup, sum bað um 15 ára skiftistíð. Tvørturímóti ! Tað var hann sum NOKTAÐI landsstýrinum tey 15 árini. Og harafturat gangi eg út frá, at samráðingaruppleggið hjá landsstýrinum var skrivað áðrenn samráðingarnar í Keypmannahavn byrjaðu, so tann óhóviska framferðin hjá forsætismálaráðharranum undir samráðingunum hevur einki við tey 15 árini at gera. Nei tað var fullveldislandsstýrið sjálvt, sum bygdi allan tann fíggjarliga partin av fullveldisætlanini á ynskið um langa skiftistíð. Og so vóru teir so smartir, at ístaðin fyri at nevna 15 ár, gjørdu teir eitt innviklað roknistykki, sum sambært fjølmiðlum líka so væl kundi enda við 63 ára skiftistíð.

– Danir skuldu gjalda so leingi sum til bar !

Samfelagið reistist

Eg eri púra samdur, tá Knút sigur, at vit hava eitt blómandi samfelag, ið megnaði at reisa seg eftir eina svára kreppu, og eg haldi, at júst hetta vísir, at orðini um, at einki ber til í heimastýrinum eru ósonn.

Skipanin fekk av fullveldislandsstýrinum skuldina fyri, at kreppan kom í 90-árunum, og kortini so kláraðu vit at reisa samfelagið aftur eftir stuttari tíð undir somu skipan. Tað sigur ikki so lítið um skipanina !

ABC-hugsjónin

Sum eina umbering fyri ikki at svara mínum spurningum vísir Knút nú á, at eg havi heldur ikki svara hansara upprunaligu spurningum. Knút skrivar: »Kjakið byrjaði við grein míni, »Sambandshugsjónin? ABC?«, har eg setti nakrar grundleggjandi spurningar, um hvør hugsjónin var, ið drívur verkið hjá ABC samgonguni.«

Nú var eg ikki komin uppí kjakið, tá hasar reglurnar vóru skrivaðar (og tí tók eg tað av góðum grundum ikki sum spurningar til mín persónliga), men Knút skal ikki hava tað at umbera seg við, so her er svarið:

ABC samgongan er samansett at trimum rættiliga ymiskum flokkum, sum hava líka so ymiskar hugsjónir. Út frá hesum hugsjónunum eru nakrar semjur (kompromis) gjørdar, og hesar eru skrivaðar í samgonguskjalið. Eg fari ikki at endurgeva alt samgonguskjalið her (tað er tað ikki pláss til), men kann nevna hesi økini burturúr rúgvuni:

- samgongan vil betra pensjónsviðurskiftini
- stimbra vinnulívið og klekja haldgóð hugskot um nýggjar vinnumøguleikar
- privatisera almennar fyritøkur, har tað kann gerast við fyrimuni
- útvega betri marknaðaratgongd til ES og onnur lond
- broyta skattaskipanina, so hon verður meira arbeiðs- og búskaparliga vakstrarfremjandi
- fáa størri ávirkan á uttanríkispolitiska økinum o.s.fr.

Ella sagt við øðrum orðum: Vit skulu hava eitt liviligt vælferðarsamfelag, har tað skal vera gott hjá Føroya fólki at búleikast.

Hvørjar hugsjónir hevði fullveldislandsstýrið?

Men so vil eg spyrja, hvørjar hugsjónir hevði fullveldislandsstýrið? Hugsjónin var fullveldi, sigur onkur, men hvat skuldi henda dagin eftir at Føroyar vóru blivnar fullveldi ? Hvørjar vóru hugsjónirnar fyri samfelagið og fólkið? Hvørjar vóru hugsjónirnar á fíggjarliga økinum (annað enn at biðja danir gjalda)? Hvussu nógvar nýggjar vinnur eru settar á stovn, meðan fullveldislandsstýrið hevur tosað um sjálvberandi búskap? Hvussu nógvur fiskur varð fluttur óviðgjørdur av landinum, tá fullveldislandsstýrið tók við, og hvussu nógv verður flutt óviðgjørt av landinum í dag? Hvørji framstig eru gjørd viðvíkjandi marknaðaratgongdini? – Hvar er sjálvberandi búskapurin? Um tað er sjálvberandi búskapur at biðja um 366 mió. krónur minni í inntøkum, hví bað fullveldislandsstýrið so ikki um at fáa eina milliard minni? (so høvdu teir verið uppaftur meira sjálvberandi – um eg havi skilt boðskapin rætt) ?

Munurin millum hugsjónirnar er í høvuðsheitum tann, at meðan fullveldislandsstýrið segði, at í Føroyum skulu føroyingar ráða, so sigur nýggja landsstýrið, at í Føroyum skulu føroyingar liva. Og so eru vit aftur har sum vit byrjaðu: Vælferð ella fullveldi! – Vel annað, tí tú fært ikki bæði!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nakað um føroyskan fótbólt og um Gundadal

Poul Michelsen

Føroyingar fyri fyrstu ferð á fundi uttalands

Fyri umleið 30 árum síðan stóð eg sjálvur, sum formaður í fótbóltsdeild ÍSF´s umboðandi føroyska fótbólt á norðurlendskum fótbóltsfundi við Laugarvatn í Íslandi.

Hetta var fyrstu ferð at føroyskur fótbóltur luttók á fundi við aðrar fótbóltssamgongur. Fyrstu ferð høvi beyðst at bera fram hugsjónarliga ískoyti til framtíðar alheims fótbóltin. Fyrstu ferð føroyingar sluppu at vísa hinum norðanlondunum á tann tørvin at sleppa at luttaka sum javnbjóðis limur í evropeiskum- og alheims fótbóltsfelagsskapum.

Hóast at fundurin við Laugarvatn gjørdist rættuliga rokmikil, eydnaðist tað at fáa bygt eina brúgv millum føroyingar og hini norðurlondini.

Formaðurin í svendska fótbóltssambandinum, formaður í norðurlendsku fótbóltssamgonguni og limur í UEFA Tori Brodd, sáli saman við Ellert Schram, formanni í Íslendska fótbólts-sambandinum átóku sær at vera talsmenn føroyinga í hesum málið.

Umleið 15 ár eftir fundin við Laugarvatn hava føroyingar fingið viðurkenning sína, tá limaskapur í teirri norðurlendsku-, evropeisku- og alheims fótbóltssamgonguni var ein veruleiki.

Fyrsti landsleikur føroyinga

Tá føroyingar spældu sín fyrsta landsdyst í fótbólt í Landskrona 12. sept. 1990 móti eysturríkarum, hevið eg tað serligu gleði at vera hjástaddur. Ein ógloymandi løta - sum, umframt dystin sjálvan, eisini goymdi hópin av kenslum um tað sum lá í søguni aftanfyri hendingina. M.a. kom eg at hugsa um, hvussu fegin eg hevið viljað at Tori Brodd, sáli var millum okkara og kundi uppliva sín leiklut í søguni. Ikki minst tí at fyrsti landsleikur føroyinga júst var Svoríki - heimlandi hansara.

Um hetta mundi var eg eisini býráðsformaður í Havn, og visti at býráðið av tað nógv, sum setti spurning við um tað var rætt, at byggja svimjihøllina á stadionøkinum, har hon nú liggur. Orsøkin var tann, at nú trongdist í Gundadali, og at møguleikarnir fyri at menna bæði bóltspæl og frælsan ítrótt í Gundadali gjørdist avmarkaðir.

Tá farið varð undir ætlaninar at gera ein alheimsfótbóltsvøll við frælsum ítrótti, gjørdist hesin veruleiki sjónligur – leistin til eina ætlan við fótbólti og frælsum ítrótti var edinfalt ov lítil, sum m.a. fyrverandi býararkitektur Gunnar Hoydal gjørdi vart við.

Neyðugt var tí at minka um rennibreytina soleiðis, at hon bert hevið 6 breytir, og tá FIFA kom við krøvum um, at fótbóltsvøllurin skuldi breiðkast frá 65 m upp í 68 m – vóru møguleikanir fyri semjum ella kompromisum ikki at fáa eyga á.

Endi varð, at avgerð bleiv tikin um, at í Gundadali skuldi fótbólturin, sum eigur sína søgu har aftur til 1908, fáa fyrsta rættin. Heldur enn eitt »kompromis« har ongin fær sítt, bleiv avgjørt at Gundadalur í høvuðsheitinum framhaldandi skuldi hýsa bóltspæli, og framhaldandi skuldi vera miðdepilin fyri føroyska fótbólt.

FSF og Býráðið ganga saman

Stríðið ella orðadrátturin um fótbóltsvøll við ella uttan rennibreyt kundi tí ikki enda øðrvísi, enn at avgerð varð tikin um at byggja fótbóltsvøll í Gundadali, sum leyk øll altjóða krøv. Ein fótbóltsvøll uttan rennibreyt. Treytirnar hjá frælsu ítróttini vóru sostatt, at hóskandi øki til rennibreyt skuldi finnast aðrastaðni. Eingin ivi eigur at vera um, at henda avgerð er löglig, er væl lýst og væl grundað.

FSF og Tórshavnar býráð gera av at ganga saman um at gera eitt alheims viðurkent fótbóltstadion í Gundadali. FSF við Torleif Sigurðsson á odda hevið alla tíðina víst á, at neyðugt var við einum viðurkendum alheims fótboltsvøll aftrat, og at Gundadalur var hóskandi pláss til endamálið.

FSF ynskti ikki, at rennibreyt var kring vøllin. FSF ynskti, at pláss skuldi verða fyri umleið 9.000 áskoðarum.

FSF viðmælti ætlanini til landsmyndugleikanar. Og tá ætlanin eisini sampakkaði við tað, sum UEFA og FIFA treyta sær av framtíðar alheims fótbóltsstadion, varð viðmæli FSF,s eisini givið hesum.

Grunnurin Tórsvøllur, sum er settur at stjórna ætlanini er skipaður soleiðis, at Tórshavnar býráð velur formannin, FSF ein nevndarlim og løgmaður ein nevndarlim. Tórshavnar Býráð vildi við hesi samanseting vísa á, at ávirkan á lidna verkið skuldi FSF, landsstýrið og býráðið hava.

Inni á heimasíðuni hjá Tórsvøllinum www.torsvollur.fo eru myndir og tekningar av teim ætlanum, sum eru møguligar at fremja einaferð í framtíðini. Hesar hugmyndirnar eru beinleiðis sprotnar úr teimum ætlanum, sum vóru grundarlagið undir fyrra projektinum við rennibreyt. Her var nevnliga eisini talan um annað virksemi s.s. hølir til ítróttarendamál, frítíðarhølir, almennar tænastur, skrivstovur, tænastufyritøkur, ítróttarbýli v.m. og her var fíggingarmynstrið eisini grundað á almennan stuðul og privatar sponsorar.

Aðalskrivari FSF skrivaði fyri tíð síðan, at Tórsvøllur tók sponsorpengar frá felagunum. Hoyrdi hetta aftur í sendingini Føroyar í Dag. Tórsvøllur hevur alla tíðina grundað sítt virksemi partvís á sponsorpengar, men vit hava so avgjørt ikki tikið nakað meira frá sponsorpuljuni, enn verkætlanin hevur havt brúk fyri. Hvørji áhugamál kann aðalskrivarin hava, tá hann roynir at seta slíkar kílar millum Tórsvøll og feløgini?

Eg læs við stórum áhuga um ætlanina at byggja nýggja fótbóltshøll í Skálabotni. Ein stór ætlan, sum eisini er grundað á sponsorpengar – sjálvsagt – ella ?

Framtíðar gras(líkis)vøllur ?

Herfyri upplýsti FSF skrivstovan, at FIFA longu næsta ár fór at viðurkenna 3. ættarliðs graslíki til landsdystir. Ein upplýsing, sum í sær sjálvum er áhugaverd, men átti at verið viðgjørd í størri samanhangi, har fyrimunir og vansar verða lýstir.

Tað er rættiliga grundleggjandi fyri eina verkætlan, sum Tórsvøll, um vit longu næsta ár kunnu legga graslíki á ístaðin fyri vanligt gras.

Fyri Tórsvøll, sum fyriskipara av dystum og tiltøkum, og fyri fótbóltin í Havn gevur hetta nýggjar møguleikar.

Ber hetta til, uttan at vit missa rættind í evropeisku kappingini, ljóðar hetta spennandi.

Fari tó fyribils at loyva mær at ivast í, um lond sum Týskland, Frakland, Ongland, Italia fara at góðtaka at leika á graslíki.

Status ídag.

Vit, sum í dag varða av dagliga rakstrinum av Tórsvølli, hava fingið viðurkenning frá Tórshavnar býráð frá fyrsta degi, og ávegis hevur býráðið bøtt munandi um umstøðunar.

Enn eru vit ikki komnir á mál, men er ikki so langt eftir, at vit kunnu siga, at karmarnir kring Tórsvøll eru nøktandi til at skipa fyri stórdystum og tiltøkum annars.

Enn vantar at fáa tekju yvir áskoðaraplássini soleiðis, at veður og vindur ikki hava so stóran ávirkan á, um fyriskipanin eydnast væl ella illa. Her verður hugsað um at áskoðarin skal fáa eitt so gott upplivilsi, sum til ber. Her verður eisini hugsað um eitt tryggari fíggjarligt grundarlag at byggja virksemið á.

Í løtuni verður tí roynt at finna útveg fyri at tekja eystaru langsíðu soleiðis, at umleið 3.000 fólk kunnu sleppa undir tak. Vit tosa her um eina íløgu uppá umleið 10 mill.

Vit hava fingið avtalur við sponsorar og ásanna, at uttan hesar, var ætlanin ikki komin so langt, sum hon er komin. Vónandi kunnu vit eisini í framtíðini fáa slíkar avtalur.

Allur rakstur av Tórsvølli verður gjørdur ókeypis, og beinasemi frá ymiskum persónum og felagsskapum hevur verið stórt. Hetta ger, at so at siga allar inntøkur fara til at gjalda aftur tey lán, grunnurin hevur tikið.

FSF og Tórsvøllur hava haft felags áhugamál av altjóða fótbóltsleikvøllinum á Tórsvølli – og eftir mínum tykki við góðum úrsliti. Tað er nú ikki hent so lítið, síðan vit byrjaðu í 1999.

Frá byrjan vóru tað tó kreftir innan FSF, sum ikki tóku so heilhjartað undir við Tórsvallarætlanini – og í sendingini Føroyar í Dag visti útvarpsverturin at siga, – at FSF ætlar sær burturúr Tórsvallargrunninum og harvið sleppa síni ávirkan á verkætlanina. Hetta kenna vit, sum varða av grunninum, onki til, men eru sjálvsagt noyddir at fyrihalda okkum til, um hetta verður so.

Um hetta skyldast, at FSF ikki longur hevur brúk fyri Tórsvølli, ella um hetta skyldast aðrar – fyri okkum ikki kendar – orsakir, kunnu vit bert gita um, men tó kunnu vit ásanna, at FSF er ein felagsskapur, sum er í stríð við seg sjálvan, at kreppan innanhýsis er við at gera meira og meira um seg, og at tað frammrættað arbeiðið, sum FSF eigur at byggja á, er við at drukna í smáligum kegli – føroyskum fótbólti til stóran skaða. Mítt ynski fyri FSF skal tí verða, at feløguni aftur gerast miðdepilin í FSF. At FSF ikki er ein felagsskapur, sum hevur nokk í sær sjálvum ella »ein statur í statinum«, men ein frammrættað samgonga av fótbóltsfeløgunum við klárum yvirornaðum málum at røkka. Tann spírin, sum í síni tíð bleiv settur niður, hevur vunnið Føroyum og føroyingum stóran sóma kring allan heim og elvt til samanhald og stoltleika millum føroyingar. FSF eigur at fjálga um hetta og leggja til brots. Málini eru har – setið kósina, og vit eru nógv sum fylgja tykkum.

Sosialurin Lesið Sosialin